*Lagt til rættis: Anna V. Ellingsgaard*
*anna@hotmail.com*

# møguleiki

## Søgu- og samfelagsdeildin

Søgu- og samfelagsdeildin bjóðar fram tvær útbúgvingar: í søgu og stjórnmálafrøði, báðar á bachelor- og masterstigi.

### Søga

Útbúgvingin í søgu leggur dent á søgugongdina frá miðøld og fram til okkara tíð. Ein partur av útbúgvingini er um Føroya søgu sæð í størri norðurlendskum ella europeiskum høpi. Studentarnir læra vísindaligt ástøði og háttaløg til tess at kunna greina ymsar søgufatanir, og eisini eru kravd skeið í samfelagsfrøði og mentanarfrøði.

Bachelor-útbúgvingin í søgu tekur trý ár. Útbúgvingin kann vera annaðhvørt 3 ára lestur í søgu, at skilja sum breitt fakøki, ella samansett av 2 ára støðisnámi við søgu sum høvuðsfaki og síðan 1 árs lestur í øðrum tilvalsfaki.

Masterútbúgvingin í søgu tekur tvey ár oman á bachelor-útbúgvingina. Masterútbúgvingin kann eisini byggja oman á aðra samsvarandi útbúgving á bachelorstigi.

### Stjórnmálafrøði

Útbúgvingin í stjórnmálafrøði leggur høvuðsdent á stjórnmálafrøðilig evni og verður útint úr somu vísindaligum sjónarhornum og við somu háttaløgum sum samfelagsfrøðilig gransking yvirhøvur nýtir. Studentarnir læra vísindaligt ástøði og háttaløg, og fáa venjing í at savna tilfar, t.d. at gera spurnakanningar og samrøður við relevantar persónar í fyrisiting o.ø. Størri kravd skeið eru altjóða politikkur og føroyskur politikkur, og annars eru skeið um demokrati, politiska mentan o.a.m.

Bachelor-útbúgvingin í stjórnmálafrøði tekur 3 ár og og verður sett saman av grundskeiðum, serskeiðum, verkætlan og serritgerð, hvørt við sínum próvtali.

Masterútbúgvingin í stjórnmálafrøði byggir á bachelor-útbúgvingina í stjórnmálafrøði og tekur tvey ár. Útbúgvingin kann eisini byggja omaná aðra samsvarandi útbúgving á bachelorstigi frá útlendskum lærustovni.

Lestur á Søgu- og samfelagsdeildini er at rokna sum fulltíðarstarv. Undirvíst verður á ymsan hátt: fyrilestrar, studentaframløgur, skrivligar venjingar og uppgávur, orðaskifti, seminar og leiðbeining. At kalla øll skeið enda við skrivligari próvtøku. Bachelornámið endar við ritgerð um sjálvvalt evni.

Fortreyt fyri upptøku er staðin miðnámsútbúgving.

### Grundskeið í lóg

Grundskeiðið í lóg er partur av bachelornáminum í stjórnmálafrøði, men er eisini ætlað fólki, ið vilja menna kunnleika sín til løgfrøðiligt háttalag og fáa betri fatan av lógum og løgfrøðiligum teksti. Dentur verður lagdur á praktiska almenna fatan av lógkunnleika, serliga at finna og tulka lóg. Harumframt verður hugt nærri at evnum innan stjórnarlóg og fyrisiting.

Tað er ikki neyðugt at hava løgfrøðiliga útbúgving fyri at fylgja skeiðnum.

Samband: ssd@setur.fo, tlf. 35 25 80

## Væl brynjaður at fara víðari

### Rókur Jákupsson Jacobsen, 29 ár, Cand.Comm., samskiftisráðgevi á Sendistovuni



**Fakliga støðið á Søgu- og samfelagsdeildini var sera høgt, so eg kendi meg væl fyri, tá eg kom á Roskilde Universitet, sigur Rókur Jákupsson Jacobsen, sum fyrst las stjórnmálafrøði á Fróðskaparsetrinum**

29 ára gamli Rókur Jákupsson Jacobsen kendi seg væl brynjaðan fakliga, tá hann fór undir lesnað á Roskilde Universitet (RUC), eftir at hava lisið stjórnmálafrøði á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum.

– Fakliga støðið á útbúgvingini í stjórnmálafrøði var fult á hædd við tað, eg kom til á RUC, so eg kendi meg rættiliga væl fyri frá byrjan. Hartil bleiv skiftið sera lætt, tí Fróðskaparsetrið hevur tætt samstarv við RUC, og í ávísan mun er frálæran á báðum støðum skipað eftir sama leisti, sigur hann.

Rókur var við í fyrsta flokkinum, sum byrjaði at lesa stjórnmálafrøði í 2000, tá Setrið fyrstu ferð bjóðaði útbúgvingina fram. Men hóast hølisumstøðurnar vóru rættiliga primitivar, minnist hann bara gott aftur á lestrartíðina.

– Setrið lat okkum fáa eitt hús, ið vit kundu brúka, sum vit vildu til fyrireiking, uppgávuskriving og annað. Tað var eitt fantastiskt stað, har vit enntá høvdu atgongd til internetið, sum als ikki var so vanligt tá. Eg helt faktiskt fram at brúka húsið, eftir at eg var farin niður at lesa og kom heim at skrivar onkrar uppgávur, minnist Rókur.

Føroyska útbúgvingin í stjórnmálafrøði vísti seg at vera ein fín lopfjøl, tá Rókur seinni valdi at lesa víðari á RUC, har hann las sosiologi og samskifti. Fakini bygdu nátúrliga á hvørt annað, og tá Rókur fór undir at skriva serritgerð, fekk hann ein føroyskan vegleiðara, sum hevði tilknýti til bæði Fróðskaparsetrið og RUC.

Hóast Rókur á ongan hátt kendi seg fakliga aftanfyri hini í flokkinum á RUC, kendist nýggja lestrarstaðið eitt sindur kollveltandi.

– Tað er jú nakað annað, tá tú knappliga situr millum fleiri hundrað onnur, sum lesa tað sama, sum tú sjálvur. Tað skapar eitt umhvørvið, sum kennist sera inspirerandi fakliga. Tá tú so eisini hevur eitt tað størsta bókasavnið í ríkinum beint í nánd, kanst tú illa ynskja tær eitt betri lestrarumhvørvi, sigur Rókur.

Og tó. Eitt er, sum Føroyar sum lestrarumhvørvi hevur fram um øll onnur.

– Í Føroyum er tað ógvuliga lætt at koma í samband við politikarar, myndugleikar, serfrøðingar og keldur, tú annars hevur brúk fyri í sambandi við uppgávur og verkætlanir. Tað lættir ikka bara nógv um, men kann ofta geva eitt innlit, sum tú neyvan hevði fingið aðrastaðni sum lesandi, sigur Rókur Jákupsson Jacobsen, Cand. comm, sum í dag starvast sum samskiftisráðgevi á Sendistovuni.

## undadeildin • Náttúruvísundadeildin

Stórur áhugi er her heima fyri at menna KST vinnur, sum kunnu styrkja føroyska vinnulívið og samfelagið. Tí er eisini átrokandi brúk fyri KT-verkfrøðingum í Føroyum.

Sum KT-verkfrøðingur hevur tú møguleika at arbeiða í KT vinnuni við framkomnum KST skipanum, bæði har tað snýr seg um "software" og "hardware, medisinskar kanningar, o.m.a.

### Master er í leitingarjarðalisfrøði

Masterútbúgvingin í leitingarjarðalisfrøði (Exploration Geophysics) tekur tvey ár. Hon er ein víðari útbúgving í leiting eftir olju og gassi og byggir á bachelor í jarð- og havfrøði.

### Norðurlendskur Master í Havøkologi og klima

'The Joint Nordic Master's Programme in Marine Ecosystems and Climate' er ein nýggj tvey ára útbúgving, sum Universitetini í Bergen, Íslandi, Aarhus og Føroyum bjóða út í felag. Hetta er ein altjóða útbúgving fyri lesandi, sum hava sína grundútbúgving innan biologiska ella fysiska havfrøði, og hava áhuga fyri tvørfakligum havfrøðiligum avbjóðingum.

Henda Master útbúgvingin byrjar í August 2009, og latið verður upp fyri umsóknum á várið 2009. 'The Joint Nordic Master's Programme in Marine Ecosystems and Climate' er vælhóskandi sum framhaldslestur omaná bachelor í Hav- og Jarðfrøði ella Lívfrøði frá NVD.

### Phd

PhD-útbúgvingar eru í løtuni á NVD í jarð- og havfrøði og lívfrøði.

Bachelorar frá NVD hava tikið víðari útbúgvingar í fleiri londum. Nevnast kunnu New Zealand, Ongland, Skotland, USA, Noreg, Svøríki og Danmark.

### Stakgreinalestur

Útbúgvingarnar á Náttúrvísundadeildini eru settar saman av modulum, og tí ber til at tekna seg til tær einstøku lærugreinirnar og taka prógv í teimum. Serstøk førleikakrøv eru tá til hvørja lærugrein sær. Hetta er ein góður møguleiki hjá teimum, sum vilja eftirútbúgva seg, ella vilja vinna sær innlit í eina nýggja lærugrein.

Umsóknarblað til stakgreinalestur á Náttúrvísundadeildini kann takast niður á nvd@setur.fo

Samband: nvd@setur.fo, tlf. 35 25 50